TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

7

Heilsu- og innlendismálaráðið,

Tórshavn 20. oktober 2017

**Hoyringsviðmerkingar til "Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni"**

Tórshavnar kommuna (TK) metir, at uppskotið í sjálvum sær er áhugavert og sýnir væl tær tvístøður, ið ofta eru millum lutfalsliga nýggja tøkni og eldri tøkni, har nýggj tøkni, hóast hon verður mett eitt nú at vera meiri umhvørvisvinarlig, ikki gongur so skjótt at innføra, m.a. tí at eitt nú oljufýr hava langa livitíð og at borgarar sum heild meta, at samlaða roknistykkið ikki er nóg áhugavert fyri tey við verandi útveganarkostnaði fyri nýggju tøknina. Ofta er talan um fitt av árum, áðrenn nýggja íløgan loysir seg.

Við verandi lóggávu er støðan, at SEV longu fremur týðandi prísdifferentering ella sonevnda prísdiskriminatión, bæði í mun til brúkarabólkar og í mun til nýtslubólkar. Bólkurin ídnaður, landbúnaður, fiskivinna v.m.fær streym fyri 1,10 kr./kwh fyri ársnýtslu hægri enn 30.000 kWh, meðan aðrir brúkarar skulu upp á ársnýtslu hægri enn 100.000 kWh fyri at fáa prísin 1,34 kr/kwh, (tó tá 4.400 kr. hægri ársgjald).

Tá ynskið er at stimbra enn meiri undir meiri umhvørvisvinarliga orkutøkni, er eisini onnur viðkomandi tøkni, ið ikki er nevnd, og sum TK metir hevði verið áhugaverd at fingið serprís til, og ikki minst fyri at økja um úrtøkuna úr grønu ravmagnsframleiðsluni hjá SEV, har tað sum skilst er møguleiki fyri enn betri úrtøku.

Her vil TK serliga vísa á tørvin, at SEV (um henda heimild verður mett neyðug!) kann veita fjarhitakervum sama grøna serprís, m.a. soleiðis at ætlanirnar hjá P/F Fjarhitafelagnum um at seta upp vatntangar, ið kundu verið hitaðir við ravmagni, somuleiðis kundu fingið ein meiri áhugaverdan prís frá SEV, og somuleiðis sjóhitaskipanir, ið TK longu hevur á tveimum støðum.

Við støði í Umhvørvispolitikkinum hjá TK frá 2016 tekur TK undir við, at fokus nú verður sett á spurningin um prís og tilskundan til nýggja og meiri grøna tøkni, men metir samstundis, at spurningurin um verandi prísskipan er viðkomandi, umframt at atlit eisini vera tikin til í hvønn mun myndugleikar skulu taka eina tøkni fram um aðra.

**Vegna Tórshavnar kommunu**

Annika Olsen
borgarstjóri

/Bjørgfríð Ludvig
kommunustjóri